## Langur sjókaðal

Fyritøkan Kodiak Kenai Cable Company, sum er skrásett í Alaska, hevur ætlanir um at leggja ein sjókaðal ímillum London og Tokyo. Kaðalin verður 15.000 kilometrar langur, og kostnaðurin er mettur til seks milliardir krónur. Verkætlanin hevur fingið heitið Arctic Line, og tað kemst av, at ætlanin er at leggja kaðalin eftir havbotninum úr Atlantshavinum vestur um Grønland og norður um Kanada og haðani vestur í Kyrrahavið. Tey, sum hava fyrireikað verkætlanina, siga, at tann nýggi kaðalin fer at stytta samskiftistíðina millum London og Tokyo meiri enn 50 prosent.



## Svii fyri norðmann

Um ein góðan mánað leggur tann serligi ST-sendimaðurin í Afghanistan, norðmaðurin Kai Eide, frá sær. Síðani tað fættist, at hann skuldi úr starvinuum, hava fjølmiðlarnir gitt, hvør skuldi taka við, og í gjár kunngjørdi ST, at tað er ein svii, sum skal loysa norðmannin av. Ban Ki-moon, ST-aðalskrivari, segði í gjár, at hann hevur gjørt av at senda svenska diplomatin Staffan de Mistura til Alghanistan sum nýggjan ST-sendimann har. Staffan de Mistura (myndin) hevur fyrr verið serligur ST-sendimaður í Irak. Hann byrjar í Kabul tann 1. mars.

# Jóannes Eidesgaard forstýrar samráðingar

**Tað fer at órógva lønarsamráðingarnar við arbeiðsgevararnar, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur hótt við at leggja størri byrðar á okkum, sigur Ingeborg Vinther**



*Politikararnir skuldu gingið á odda sum eitt gott fyridømi og spart hjá hjá sjálvum, áðrenn teir leggjasta gomul, sjúk og veik, sigur Ingeborg Vinther, sum langt síðani hevur mist álitið á, at tað ber til at gera bindandi avtalur við politiska myndugleikan*

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevur loypt órógv á føroysku arbeiðarafeløgini, at Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur almannakunngjørt, at tað verður neyðugt at breiðka skattagrundarlagið við hægri avgjøldum, bæði á vinnulív og á borgarar.

Arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarar skulu undir lønarsamráðingar nú í vár í sambandi við, at sáttmálin gongur út á midnátt 30. apríl.

Í Sosialinum í gjár førdi Hans Joensen, formaður í HavnarArbeiðsmannafelag, fram, at tað fer at ávirka samráðingarnar og lønarkrøvini, at Jóannes Eidesgaard hevur hótt við at skerja livistøðið enn meiri við øktum avgjøldum.

Og Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, er púra samd.

- Sjálvandi fer tað at seta síni spor í samráðingunum, at sjálvur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum longu frammanundan hevur hótt okkum við at leggja enn fleiri avgjøld á okkum.

### Skuldi tikið um rótina

Ingeborg Vinther heldur, at vanligi løntakarin tolir hvørki fleiri avgjøld ella hægri skatt, tí hann er ivaleysa hart kroystur frammanundan.

Hinvegin er hon av teirri áskoðan, at bæði Jóannes Eidesgaard og restin av politikarunum skuldu heldur víst ein góðan vilja og gingið undan við sparingum, áðrenn lagt verður eftir vanligum løntakarum, pensjónistum, veikum og sjúkum, sum hon málber seg.

- Samgongan kundi víst vegin við at spart í miðfyrisitingini, áðrenn hon legði á aðrar bólkar í samfelagnum

Hon sipar til at fyri nøkrum árum síðani vóru fimm ella seks landsstýrisfólk, men nú eru tey níggju í tali við hvør sínari umsiting.

Eitt aðalráð, sum hon heldur átti at verðið niðurlagt, er uttanríkisráðið, sum er nýtt og sum átti at verðið niðurlagt aftur.

Annars heldur hon eisini, at politikararnir kundu avtikið teir skattafríu ágóðar teir hava fyri at gingið undan sum eitt gott fyridømi, nú sparast skal allastaðni.

# Mist alt álit á politikarunum

**Ingeborg Vinther hevur ikki álit á, at tað ber til at gera eina avtalu við politiska myndugleikan um lønarkarm og fíggjarlig inntriv**

SAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg havi verið fakfelagsleiðari í 30 ár, men trýrt tú virkuliga, at eg havi álit á, at tað ber til at gera eina avtalu við politikarar?

Ingeborg Vinther ljóðar rættiliga uppgevandi, tá ið vit spyrja hana, hvat hon heldur um uppskotið hjá formanninum í Havnar Arbeiðsmannafelag um trýpartasamráðingar millum fakfeløgini, arbeiðsgevararnar og politiska myndugleikan.

Endamálið við slíkum samráðingum skuldi verið at fingið eina avtalu við politiska myndugleikan um fíggjarlig inntriv fyri at forða fyri, at lønin verður etin upp aftur av skattum og avgjøldum.

Afturfyri kundi lønarkrøvini so verður tálmað fyri at bøta um kappingarførið hjá vinnuni og livistøðið hjá løntakarunum.

Ingeborg Vinther sigur, at tað ljóðar dámligt at gera trýpartaavtalur um ein ávísan lønarkarm, sum politikarar sostatt ikki binda seg til at eta uppaftur við øktum avgjøldum og skattum

### Púra onki álit

Men hon staðfestir í sama andadrátti, at hon hevur ikki tað allarminsta álitið á, at tað hevði borið til at gjørt eina slíka avtalu millum fakfeløg, arbeiðsgevarar og politiska myndugleikan.

- Eg vísi ikki hugskotinum frá mær, men tíverri hava vit ikki teir røttu politikararnir til at vit kunnu hava álit á, at ein slík avtala hevði verðið hildin.

Hon sigur, at hetta eru tær beisku royndirnar hon hevur gjørt sær eftir 30 ár í fakfelagsarbeiði.

- Eg havi langt síðani mist álitið á politikararnar.

Hon sigur, at hon hevur ov nógv dømi um, at politikarar hava brotið avtalur, teir hava gjørt við fakfeløgini.

Hon sigur, at tað seinasta dømið var serliga groft.

Tað var tá ið politiski myndugleikin vildi gera tað lættari at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya.

- Tá lovaðu politikararnir okkum, andlit til andlits, at tað skuldi ongin trupulleiki vera at ganga krøvum frá fakfeløgum á møti um eftirlit og mannagongdir.

- Men tá ið avtornaði vóru okkara ynski ikki eftirlíkað, tí lógin varð smíðað fullkomiliga eftir arbeiðsgevarans høvdið.

Ingeborg Vinther sigur, at hennara tykki var hetta so stórt álitisbrot, at tað bøtist ikki aftur.

Tí er tað eftir hennara tykki ikki møguligt at gera slíkar trýpartaavtalur við politiska myndugleikan, hóast tankin er góður.